# Andlát

## á sjúkrahúsinum

HENT AT VITA



KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

Við deyða og jarðarferð er nógv hjá teimum avvarðandi at taka støðu til. Hesin faldarin er ætlaður sum hjálp til at gera mest neyðugu fyrireikingarnar.

Í SAMBANDI VIÐ ANDLÁT SKULU AVVARÐANDI SETA SEG Í SAMBAND VIÐ TEL. **454545**, LOKAL **4507**

## Kista og líkverja

Vanliga bíleggur sjúklingaskrivstovan kistu og líkverju. Hjálagt er listi yvir kistuveitarar. Tað ber eisini til at vera í egnum klæðum. Tá skulu avvarðandi koma við klæðunum til portørarnar.

Sjúklingaskrivstovan skal hava upplýsingar um navn, teldupost-adressu og bústað hjá avvarðandi, ið skal standa fyri og gjalda kistuna og líkverjuna. (Heilsutrygd veitir stuðul til gravarhjálp smb. umsókn, tó í mesta lagi 5.000 kr.) Sí www.heilsutrygd.fo.

## Kapel

Ynskja avvarðandi at síggja tann deyða, meðan líkið stendur undir børu, verður avtala gjørd við seingjardeildina.

Tey avvarðandi taka støðu til, nær kistulokið skal leggjast á og farið verður úr kapellinum.

Tað ber til hjá teimum nærmastu at savnast til eina friðarliga løtu, har tey kunnu siga eitt seinasta farvæl. Avtala hesum viðvíkjandi skal gerast við Sjúklingaskrivstovuna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, tel. 454545, lokal 4507.

Avvarðandi avtala sjálvi við prest/samkomuleiðara um at halda eina bønarløtu ella kórseting, tá kistan kemur í kirkjuna/samkomuhúsið. Avvarðandi eiga at siga Sjúklingaskrivstovuni frá, nær tey ætla at kistan fer úr kapellinum.

## Lýsing

Kringvarp Føroya hevur tel. 347500 og teldupost: andlat@kvf.fo. Tað er ókeypis at lýsa andlát og jarðarferðir.

## Gravarar og líkbilur

Avtala skal gerast við gravara. Gravarar skulu hava boð, áðrenn jarðarferðin er kunngjørd.

Avvarðandi bíleggja sjálvi líkbil, við at seta seg í samband við føraran av líkbilinum hjá avvarðandi kommunu.

Gravarar og líkbilur í Klaksvík, tel. 238898 ella 226377. Flutningur við kommunala líkbilinum er ókeypis.

## Børuprýði

Um kistan skal prýðast við blómum, kann børuprýði bíleggjast frá einum av blómuhandlunum. Summardáin hevur tel. 456193 og Blómuhandilin Flora hevur tel. 455115. Tey syrgja fyri, at blómurnar koma út á Klaksvíkar Sjúkrahús. Minnist til at gera avtalu um koyring av blómum og kransum út á grøvina.

## Fráboðan

Sjúklingaskrivstovan boðar myndugleikum, presti og skiftirætt-inum frá andlátinum.

## Eftirmeting

Umleið ein mánað aftaná jarðarferðina, ringir sjúkrarøktar-frøðingur til avvarðandi av teimum, sum hava verið innløgd á KS3, fyri at eftirmeta sjúkugongdina.

*Við samkenslu*

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

GRAFIA / ESTRA

Sjúkrahúsbrekka 1
FO-700 Klaksvík
Føroyar

Tel. +298 454545
ks@ks.fo

**www.ks.fo**

KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS